Føroya Ungdómsráð
The Faroese Youth Council

# Ársfrágreiðing FURs 2018



# Innihaldsyvirlit

Føroya Ungdómsráð ..... 3
Fíggjarlig viðurskifti..... 3
Starvsstjórnin..... 3
Dagliga virksemið..... 4
Árligur stuðul til limafeløg og lokalfeløg..... 4
    Broyting í praksis ..... 5
Umboðsstjórnarfundur..... 5
Stuðulsgrunnur FURs ..... 6
    Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs..... 6
    Annar stuðul ..... 7
Heiðurslønir ..... 8
Faldarar..... 9
    Faldari *"Tak væl ímóti"* ..... 9
    Faldari um kynsligan ágang móti børnum og ungum ..... 9
Lýsingarstuðul Portalurin..... 10
Les og Lær í Føroyum..... 10
NSU ..... 11
Umboðan á Norðurlendskum ráðstevnum v.m...... 11

## Føroya Ungdómsráð

FUR er felagsumboð fyri landsumfatandi barna- og ungdómsfelagsskapir í Føroyum við 22 virknum limafeløgum og 33 lokalfeløgunum, sambært skrásetingarskjølunum fyri árið 2018.

FUR umboðar íalt umleið 4.000 børn og ung í Føroyum yngri enn 30 ár, sum eru í sjálvbodnum barna- og ungdómsfelagsskapum við fjølbroyttum frítíðarvirksemi innan sjónleik, tónleik, føroyskan dans, kórsang, fráhaldsvirksemi, politisk ungmannafeløg, mannarættindi, kristiligi barna- og ungdómsvirksemi, millumlanda barnalegur, skiftisnæmingar, skótar og annað barna- og ungdómsvirksemi.

FUR hevur til endamáls, at:

- vera felagsumboð fyri limafelagsskapirnar
- viðgerða spurningar, ið viðvíkja føroyskum ungdómi
- skapa áhuga fyri ungdómsmálum
- eggja ungdóminum at taka lut í og fáa ávirkan á samfelagið
- umboða limafelagsskapirnar í samstarvi við myndugleikarnar
- menna samstarvið og sínámillum fatan millum føroyskan ungdóm
- menna millumtjóða fatan

## Fíggjarlig viðurskifti

FUR verður fíggjað á Fíggjarlógini og við veddingarpengum, sbrt. løgtingslóg um ítróttarvedding, og við limagjaldi.

Játtanin á fíggjarlógini til FUR var í 2018, eins og í 2017, kr. 330.000, og er m.a. ætlað til upplýsing um útbúgvingarmøguleikar.

FUR fekk útlutað kr. 2.554.000 frá Sp/f Ítróttarvedding í 2018.

## Starvsstjórnin

FUR verður stjórnað av einari starvsstjórn, sum hevur 5 limir og 2 eykalimir. Starvsstjórnarlimir verða valdir á landsfundinum fyri eitt ár ísenn, meðan formaðurin verður valdur fyri 2 ár, síðani fyri 1 ár.

Starvsstjórnin hevur verið mannað soleiðis, sbrt. vali á Landsfundi FURs 2018:
Rói B. Poulsen, *formaður*
Ragna Maja Kruse, *nevndarlimur*
Asta Abrahamsen, *nevndarlimur*
Ebba Sofía Kruse, *nevndarlimur*
Vígdis Joensen, *nevndarlimur*
Brandar Heðinsson, *eykalimur*
Olga Arnfinnsdóttir, *eykalimur*

Starvsstjórnin hevur havt 6 fundir í starvsstjórnarskeiðnum 2018-2019.

## Dagliga virksemið

FUR umsitur árliga stuðulin, sambært løgtingslóg um ítróttarvedding til limafeløg og lokalfeløg og sambært reglugerð og viðtøkum fyri FUR, og skal tryggja m.a., at treytirnar eru loknar og at stuðulin verður nýttur sambært reglugerðini.



Eisini umsitur FUR Stuðulsgrunn FURs, har talan somuleiðis er um fyrisiting og um starvsstjórnaravgerðir. FUR fyrireikar somuleiðis fyrispurningar og tilmæli í sambandi við limaupptøku.

FUR er limur í Norðurlendsku Samskipanini fyri Ungdómsarbeiði (NSU). FUR samskipar kunning v.m. í samband við at føroysk ung luttøka á ráðstevnun, leiðaraskúla, ungdómsviku v.m.

FUR svara ymsum dagligum fyrispurningum í sambandi við barna- og ungdómsarbeiði frá einstaklingum, felagsskapum í Føroyum og uttanlands og frá føroyskum myndugleikum v.m.

## Árligur stuðul til limafeløg og lokalfeløg

Fyri at fáa árligan stuðul skal talan vera um landsfelagsskap, sum er limur í FUR, ella lokalfelag, sum hevur limaskap í einum av limafelagsskapum FURs.

18 limafeløg og 25 lokalfeløg fingu játtað árligan stuðul í 2018 fyri stuðulsárið 2017.

Limafelagsskapirnir fingu kr. 1.061.965 íalt, og lokalfeløgini fingu íalt kr. 627.326 í 2018. Samlaður árligur stuðul til limafelagsskapir og lokalfeløg var kr. 1.689.291 í 2018.

Limafelagsskapir, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
3. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir undir 30 ár pr. 31.12. í undanfarna ári við umboðum í minst trimum av hesum økjum: Suðurstreymoy, Norðurstreymoy, Vágar, Eysturoy, Norðuroyggjar, Sandoy og Suðuroy.
4. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga, fyri hvønn einstakan lim.
5. Í minsta lagi 30 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
6. Fólkaræðisligar viðtøkur, har tað eru ásetingar, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
7. Egna nevnd og egið virksemi.
8. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.

*Stk. 4.* Lokalfeløg, sum søkja, skulu lúka hesar treytir og hava:

1. Heimstað í Føroyum.
2. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir undir 30 ár pr. 31.12. í undanfarna ári. Eru fleiri enn eitt lokalfelag í sama býi/bygd, skulu tey fylgjandi lokalfeløgini hava í minsta lagi 25 gjaldandi limir hvørt.
3. Limagjald, sum skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga, fyri hvønn einstakan lim.
4. Í minsta lagi 10 gjaldandi limir í undanfarna kalendaraári.
5. Fólkaræðisligar viðtøkur, har tað eru ásetingar, sum tryggja, at limir yngri enn 30 ár hava ávirkan á leiðsluna.
6. Egna nevnd og egið virksemi.
7. Verið limir í landsfelagi í minsta lagi eitt ár, áðrenn tey kunnu søkja um stuðul - tó undantikið úr Stuðulsgrunni FURs.

8. Limaskap í einum landsfelagi. Lokalfeløg kunnu - í stuðulshøpi - bara verða limir í einum landsfelagi.
9. Sent umsókn rættstundis, sbrt. § 4 í hesi reglugerð.

Næmingafeløg verða ikki roknaði sum lokalfeløg, men tey kunnu søkja stuðul á kr. 2.000,- hvørt ár. Stuðul kann ikki veitast til ítróttarlig endamál.

### Broyting í praksis

Starvsstjórnin hevur avgjørt, at broyta praksis í samband við umsiting av umsóknum til árliga stuðulin viðvíkjandi 7 daga freistini.

> §4, stk. 3 í Reglugerð FURs er orðað soleiðis:
> *"FUR hevur skyldu til at eftirkanna, um allar innkomnar umsóknir eru fullfíggjaðar. Eru umsóknir, ið ikki eru fullfíggjaðar, hevur FUR skyldu til at kunna feløgini um møguligar manglar við umsókn teirra innan 7 dagar. Eftir hetta hevur viðkomandi felagsskapur 7 dagar at fáa sína umsókn í rættlag, soleiðis at hon kann viðgerast. Er tað soleiðis, at felagsskapurin enn ikki hevur latið inn fullfíggjaða umsókn eftir longdu tíðarfreistina, verður hon at rokna sum ikki innkomin, og tískil verður eingin stuðul útgoldin fyri viðkomandi ár."*

FUR hevur í nógv ár umsitið ásetingina í stk. 3. í § 4 í REGLUGERÐ Spf. Ítróttarvedding til FUR og limafelagsskapirnar soleiðis, at felagsskapir hava fingið rullandi 7 dagar.

Orsøkin til, at starvsstjórnin í FUR broytir praksis er, at tað er komið fyri, at feløg tilvitað senda ófullfíggjaðar umsóknir inn uppá tað, at tey fáa 7 dagar afturat, at lata skjølini inn. Tað er eisini komi fyri at okkurt felag hevur latið 1-2 skjøl inn í senn. M.a. kann nevnast, at hóast umsóknarfreistin er 1. apríl á hvørjum ár, so tók tilgongdin í 2018 2 mðr., t.e. fram til seinast í mai mánað. Hetta hevur tað ávirkan, at aðrir felagsskapir, sum hava lata umsóknina inn fullfíggjaða og til tíðina, ikki kunna fáa stuðulin útlutaðan fyrrenn allar umsóknirnar eru fullfíggjaðar.

Broytingin í praksis er, at FUR framyvir ikki fer at geva rullandi 7 daga freist. 7 daga freistin verður givin einaferð til at lata inn fullfíggjaða umsókn.

## Umboðsstjórnarfundur

Umboðsstjórnin í FUR hevði fund 24. okt. 2018. Viðmerkjast skal, at umboðsstjórn FURs hevur ikki verið kallað saman í fleiri ár.

Á skránni var broyting í praksis ísv. árliga stuðulin, lýsingarstuðul til FUR frá Portalinum til at kunna um limafelagsskapir FURs og undir ymiskt kom mál viðvíkjandi faldara um kynsligan ágang móti børnum.

14 limafeløg av íalt 22, vóru umboðaði á fundinum.

> Í § 7 í viðtøkum FURs eru hesar ásetingar um Umboðsstjórnina:
> *"Umboðsstjórnin skal virka sum kunnandi og mennandi millumliður millum starvsstjórnina og limafelagsskapirnar. Hon skal í virki sínum leggja seg eftir at eggja limafelagsskapunum og starvsstjórnini í arbeiðnum fyri endamáli FURs. Umboðsstjórnin kann av sínum eintingum taka spurningar upp til viðgerðar og seta arbeiðsbólkar at taka sær av serstøkum uppgávum."*

Formaðurin greiddi frá, at starvsstjórnin ætlar, at broyta praksis í samband við umsiting av umsóknum til árliga stuðulin.

Spurt var, um umboðsstjórnin hevði viðmerkingar til at starvsstjórnin í FUR ætlar at broyta praksis soleiðis, at felagsskapir hava 7 dagar at fáa sína umsókn í rættlag, t.e. at seinasta freist fyri hesum er 7. apríl á hvørjum ári og ásetingin verður neyvt fylgt í hesum sambandi. T.e., at broytingin í praksis er, at FUR framyvir ikki fer at geva rullandi 7 daga freist. 7 daga freistin verður givin einaferð til at lata inn fullfíggjaða umsókn.

Niðurstøðan á umboðsstjórnarfundinum var, at eingin viðmerking ella mótmæli var til omanfyrinevndu praksis broyting.

Greitt var víðari frá, at um broyting verður gjørd í praksis, so eigur at vera kunnað væl og virðiliga, tí hevur stjórnin kallað umboðsstjórnina saman. Heitt var á fundar luttakararnar um, at kunna baklandið og tey, sum sita við arbeiðinum at gera umsóknina til FUR um árliga stuðulin. FUR fer eisini at kunna feløgini um broytingina.

## Stuðulsgrunnur FURs

Eftir umsókn kann stuðul latast til limafelagsskapir og lokalfeløg fyri serliga góðar verkætlanir børnum og ungum at gagni, ella fyri samfelagsgagnligar verkætlanir, har børn og ung eru virkin.

Stuðul úr Stuðulsgrunni FURs verður býttur so ofta, sum starvsstjórnin heldur tað hóska best. Ongar umsóknarfreistir eru galdandi og umsóknir koma til viðgerðar og verða svaraðar, so hvørt tær koma inn.

Tey, sum fáa stuðul úr Stuðulsgrunni FURs, hava skyldu til at lata FUR eina skrivliga frásøgn frá tí stuðlaðu verkætlanini í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at hon er framd. Stuðul verður bert latin eina ferð til sama tiltak. Starvsstjórnin tekur støðu til umsóknirnar. Starvsstjórnin kann eisini lata vera við at veita stuðul, um ongin skikkað umsókn eftir hennara meting er komin.



Serstakt umsóknarblað er gjørt, sum skal fyllast út, so allir upplýsingar eru til taks, tá starvsstjórnin viðger og tekur støðu til umsóknirnar.

### Umsóknir til Stuðulsgrunn FURs

Í roknskaparárinum 2018 varð stuðul latin til verkætlanir úr Stuðulsgrunni FURs uppá íalt kr. 296.093.

**Játtaðar umsóknir úr Stuðulsgrunni FURs í 2018**

| Stuðulsgrunnur FURs | Verkætlan | Stuðulsumbøn | Játtað |
|---|---|---|---|
| **Dramaverkstaðið** | 3 leikir hjá barna- og ungdómsbólkum | 31.700 | 20.000 |
| **Framsøkin Ung** | Kjaktiltak um upplatingartíðir hjá skeinkistøðum | 16.000 | 8.000 |
| **Dramaverkstaðið** | Leikaløtan 2017 | 42.000 | 20.000 |
| **Dramaverkstaðið** | Luttøka við leikinum Aksið á Landsfestivali í Danmark | 55.000 | 21.000 |
| **Sosialistisk Ung** | Luttøka á skeiði hjá Danmarks Socialdemokratiske Ungdom (DSU) | 4.939 | 4.200 |
| **Havnar KFUK skótar** | 90 ára stovningarhald | 16.200 | 10.000 |
| **KFUM skótarnir í Føroyum** | Luttøka á Nordisk Spejderkonference 2018 | 8.800 | 2.800 |
| **Skótafylkið Tórir Beinirsson** | Uppstart av skótafylki Tórir Beinirsson | 15.860 | 5.000 |
| **Unga Tjóðveldi** | Luttøka á ungdómsfestivali hjá Eindarlistanum og Socialistisk Ungdomsfront | 2.500 | 2.800 |
| **Skótalið KFUM's** | Legubálsøki í Havnardali | 60.000 | 17.500 |
| **Ung í Dansi** | Luttøka á Dansistevnuni Nordisk Sommerleger í Svøríki | 15.000 | 10.000 |
| **Losjan Glotti** | Undómsleikuppsetan av leikinum Hedda Gabler | 66.566,5 | 25.000 |
| **Føroya KFUK skótar** | Luttøka á ráðstevnuni ReGeneration 2030 | 3.470 | 3.470 |
| **Skótalið KFUM's** | Heinastova | 55.000 | 35.000 |
| **Unga Samband og Framsøkin Ung** | Kjakfundur um føroysk ung og norðurlendska samstarvið | 3.500 | 3.500 |
| **Føroya KFUK skótar** | Skeið um retorikk, WAGGGSs programmið og heimsmálini | 13.322,67 | 13.322,67 |
| **Amnesty** | Verkætlan um ung og aktivismu | 25.258 | 10.000 |
| **Dramaverkstaðið** | Leikaløtan 2018 | 40.000 | 20.000 |
| **Dramaverkstaðið** | Ljóspultur og frálæra um ljóðsútgerð | 85.000 | 12.000 |

Starvsstjórnin hevur viðgjørt 22 umsóknir um stuðul úr stuðulsgrunni FURs í 2018 frá limafeløgum og lokalfeløgum í FUR. 19 verkætlanir fingu játtað stuðul og 3 umsóknir fingu noktandi svar.

## Annar stuðul

Starvsstjórnin hevur játtað stuðul kr. 12.000 til Gentur Rokka, ein rokklega fyri gentur 2.-6. Juli 2018 í Tórshavn.







Eisini hevur stjórnin, játtað stuðul til upplýsandi tilfar í Føroyum og í hinum Norðanlondunum um ágang og harðskap móti børnum og ungum við kr. 40.000. Upplýsandi tilfarið var gjørt í samband við og sum uppfylging til ráðstevnu í Føroyum 20. – 22. aug. 2018 "*In the Best Interests of the Child: Rhetoric or Reality*?.

## Heiðurslønir

Starvsstjórnin í FUR hevur samtykt, at taka skipanina upp aftur frá 1990unum at lata heiðurslønir til verkætlanir hjá lima- og lokalfeløgum í FUR. Latnar verða upp til tríggjar heiðurslønir. Heiðursløn FURs er eitt heiðursbræv og ein heiðursløn millum kr. 5.000 - 10.000.

Veittar kunnu verða millum ein og tríggjar heiðurslønir. Heiðurslønin verður eisini givin til einstaklingar, umframt til verkætlanir.

Øll kunna innstilla verkætlanir og einstaklingar til heiðursløn m.a. eru tað ikki bert nevndirnar í feløgunum, sum kunna innstilla, men eisini einstakir limir, eins og foreldur v.m.  Starvsstjórnin kann eisini taka avgerð um, at lata heiðursløn til verkætlanir og einstaklingar.

Endamál FURs við at lata heiðurslønina er:

1. at geva eldsálum innan barna- og ungdómsfelagarbeiði viðurkenning
2. at geva virknum barna- og ungdómsfeløgum viðurkenning fyri sítt arbeiði
3. vekja áhugan millum børn og ung fyri sjálvbodnu barna- og ungdómsfelagsskapunum
4. at vísa á samfelagsliga týdningin av arbeiðinum hjá sjálvbodnum barna- og ungdómfelagsskapum.

**Heiðurslønir latnar á Landsfundi FURs 2018**

- **Títtlingaleiðararnar hjá Havnar KFUK-skótum**
  Títlingaleiðararnir hjá Havnar KFUK-skótar fingu heiðursløn fyri teirra sera góða arbeiði at geva gentunum góðar og mennandi avbjóðingar, ið ger, at tær vaksa í trúnni á seg sjálvar. Til hetta arbeiði hava tær m.a. arbeitt við ”Free being me” verkætlanini, ið serliga er gjørd, fyri at læra at góðtaka seg sjálvan, sum ein er - at vit øll eru góð nokk sum vit eru.

  

  Eitt foreldur hevur skrivað soleiðis til ein av skótaleiðarunum: *”Tit eru óførar, dugnaligar, hjartaligar, ótroyttiligar! Vit eru heppin at hava so góðar kvinnur at leggja okkara børnum so gott í beinið. So ein hjartans tøkk kemur frá okkum. Tit eru gull verdar!”*

- **Bogi F. Sigurstein, leiðari hjá Skótaliði KFUMs**
  Bogi F. Sigurstein fekk heiðursløn fyri sítt trúfasta og miðvísa arbeiði at tryggja øllum í skótaliðnum menning og lívsútbúgving og at leggja lunnar undir øllum virkseminum hjá Skótaliði KFUM’s.

  Bogi F. Sigurstein arbeiðir miðvíst fyri at gera umstøðurnar hjá úlvum, skótum og leiðarum enn betri enn tær eru í dag. Ímillum avrik hansara kann nevnast Bogastova í Havnardali.

- **Høgni Jensen, leiðari innan Føroya Skótasamband**
  Høgni Jensen fekk heiðursløn fyri sítt stóra arbeiði innan skótarørsluna og fyri at flyta føroysku

skótarørsluna framá. Høgni Jensen hevur verið leiðari í Skótafylki Sigmunds Brestisson í 22 ár og hevur verið sera virkin í landsarbeiði bæði hjá Føroya Skótasambandi, Føroya Skótaráð og innan Skótahjálpina.

Sum leiðari hevur Høgni Jensen fingið ungfólk at taka ábyrgd og leiðslu, og hevur staðið á odda fyri uttanlandslegum. Fleiri av skótunum hjá Høgna Jensen, (bæði fyrrverandi og núverandi) eru í dag, at síggja í fremstu røð í samfelagnum.

# Faldarar

## Faldari *"Tak væl ímóti"*

ÍSF og FUR samstarva um, at gera ein faldara TAK VÆL ÍMÓTI. Í faldaranum er ítøkiligar loysnir til ta góðu móttøkuna í felagsskapinum.

Endamálið við faldaranum er, at viðvirka til, at øll fara heim við kensluni "*Her havi eg hug at koma aftur*", tá tey byrja í einum nýggjum felagsskapi. Tíverri er tað ikki altíð so, men í faldaranum eru einfaldar loysnir og uppskot til, hvussu ein kann virka fyri at tryggja tað góðu móttøkuna.


Samstarv millum ÍSF og FUR

4 dømir eru í faldaranum, sum barna- og ungdómsfelagsskapir í ÍSF og FUR hava skrivað. Dømini eru lýst við eini vánaligari móttøku og síðani við eini góðari móttøku. Harafturat eru punktir undir hvørjum dømi við avgerandi gerðum, umframt spurningum, sum mælt verður til, at taka upp í felagsskapinum.

Ætlanin er, at hvørt felag fær nøkur eintøk og at faldarin verður tøkur á fur.fo sum pdf. til at heinta niður og brúka.

## Faldari um kynsligan ágang móti børnum og ungum

Á umboðsstjórnarfundinum 24. okt. 2018 reisti limafelag í FUR, spurningin um kunnandi tilfar um kynsligan ágang móti børnum og ungum. Í hesum sambandi var víst til faldara, sum FUR gjørdi fyri árum síðani "Tá spælið verður spilt", ið var kunning til barna- og ungdómsfeløg í FUR, um kynsligan ágang móti børnum og ungum.

Niðurstøðan á umboðsstjórnarfundinum var, at FUR skal kanna, hvat arbeiði verður gjørt í Føroyum og øðrum norðurlondum fyri at kunna og fyribyrgja kynsligan ágang móti børnum og ungum í samband við barna- og ungdómsarbeiði og meta um, hvussu eitt slíkt upplýsingar- og fyribyrgingararbeiði kundi verið skipað í samstarvi við viðkomandi partar.

Síðani hava verið fundir við ymsar partar m.a. ÍSF, sálarfrøðingar og Almannamálaráðið, at umrøða hvat arbeiði er gjørt innan økið, at kunna um kynsligan ágang móti børnum og ungum og, hvat møguliga kundi veirð gjørt. Eingin endaliga niðurstøða er gjørd enn, men FUR arbeiðir víðari við málinum.

## Lýsingarstuðul Portalurin

FUR hevur fingið kr. 100.000 frá Portalinum í stuðul til lýsingar, harav kr. 50.000 til Les og Lær í Føroyum og kr. 50.000 til at kunna um Barna- og ungdómsarbeiði hjá feløgum, sum eru limir í FUR.

FUR kann sostatt lýsa ókeypis fyri limafelagsskapir og lokalfeløg í samband við lýsingarstuðulin frá Portalinum
Tað ber til t.d. at lýsa um:

1. Felagið generelt
2. Melda teg sum lim
3. Aðalfund
4. Tiltak (tað kann vera bæði limatiltak og alment tiltak)

Til endamálið hevur FUR gjørt eitt einfalt umsóknarskjal. Spurt verður, um endamálið við lýsingini og um tað er ein dagfesting, tá lýsingin skal takast av. Eisini, verður biðið um ein stuttan tekst til lýsingina - *mælt verður til at leggja meiri útgreinaðan og nágreiniligan tekst á heimasíðuna ella á facebook profilin hjá felagnum, hvar* lýsingin skal leinkja til t.d. heimasíðu ella facebook og mynd.

## Les og Lær í Føroyum

Les og Lær í Føroyum er eitt samstarv millum FUR, Mentamálaráðið, yrkisfeløg og arbeiðsgevarafeløg.

Ein grundleggjandi fortreyt fyri, at ung velja at útbúgva seg í Føroyum er kunning um útbúgvingartilboðini í Føroyum. Tískil tók FUR í 2013 stig til Les og Lær í Føroyum.

Les og Lær í Føroyum fevnir um tvær heimasíður, har upplýsingar um læru og lestrarmøguleikar í Føroyum eru savnaðar. Starvsstjórnin hevur avgjørt ikki at lata bókina Les og Lær í Føroyum út aftur í pappírsformi. Ístaðin verður orkan nýtt til heimasíðurnar og til kunning og marknaðarføring.

Á heimasíðuni www.les.fo eru lýsingar av útbúgvingum, vegleiðingar, filmsbrot og onnur kunning. Heimasíðan www.studyinfaroeislands.fo er ætlað lesandi úr útlondum og lýsir tí útbúgvingar, stakgreinar og onnur lestrartilboð, sum eru áhugaverd í hesum sambandi. Síðan fevnir eisini um praktisk viðurskifti, t.d. uppihaldsloyvi, arbeiðsloyvi, bústaðarmøguleikar, skattlig viðurskifti, livikostnað o.a.

Tilfarið er savnað inn frá Mentamálaráðnum, Yrkisdeplinum, útbúgvingarstøðum, stovnum og fyritøkum.

## NSU

Á Ársfundinum hjá NSU 2018, var Brandar Heðinsson valdur sum umboð í stýrinum fyri NSU.

NSU umboðar umleið 700.000 limir í barna- og ungdómsfeløgum í Norðurlondunum.

Endamálið við NSU er, at styrkja samstarvið og felagskensluna millum politiskar óheftar ungdómsfelagsskapir í ymsu norðurlendsku londunum og at fremja fakligu- og mentanarligu endamálini, sum hesi feløgini virka fyri. Á hvørjum ári skipar NSU fyri 2-3 ráðstevnum, sum limafeløg og lokalfeløg í FUR hava møguleikan at senda umboð til.

## Umboðan á Norðurlendskum ráðstevnum v.m.

2 føroysk umboð luttóku á Leiðaraskúlanum hjá NSU “Equality Bootcamp” 9.-14. mai í Malmø. Føroysku luttakararnir vóru Brandar Heðinsson, fyri starvsstjórnina í FUR og Petur Pauli á Høvdanum fyri Unga Tjóðveldi.

1 føroyskt umboð luttók á ráðstevnu í Stockholm um, hvussu viðurskiftini hjá ungdómsfeløgum kunna betrast 24. mai 2018. Fyriskipari var LSU, sum er svenska ungdómsráðið. Føroyski luttakarin var Elisa Abrahamsen fyri starvsstjórnina í FUR.

2 føroysk umboð luttóku á Ráðstevna í Álandi um burðardygga nýtslu og framleiðslu undir Agenda 2030 hjá ST. Luttakararnir vóru Súsanna Hjallnafoss og Eik Óladóttir Gullbein fyri Føroya KFUK skótar. Ráðstevnan var 18.-20. august 2018 í Álandi.

1 føroyskt umboð luttók á ráðstevnu í Stockholm, 22.-24. okt. 2018. Evnið á ráðstevnuni var, hvussu ein kann inkludera ungdóm frá fíggjarligum og geografiskt marganiseraði økir. Fyriskipari var MUCF, svenski myndugleikin í ungdómsmálum. Føroyski luttakarin var Vígdis Joensen fyri starvsstjórnina í FUR.